PRIX

**Hálvfinala – Mentanarhúsið í Fuglafirði – leygarkvøldið 15. mars kl. 21.00**

## Mind's Eye

**Eyðun Mortensen – sang**
**Hans við Neyst – gittar**
**Palli Klein – gittar**
**Regin Mortensen – bass**
**Jens Pauli Joensen – trummur**



Bólkurin byrjaði fyri eini seks ár síðani. Tá var talan um bólk við gittari, bassi og trummum, men ongum sangara. Síðani bólkurin var stovnaður hava ikki verið góðar umstøður at venja í, og teir leitaðu í fleiri ár eftir hølum uttan eydnu.

Ikki fyrr enn guitarspælarin ein dagin í fjør kom heim frá arbeiði, og pápi hansara hevði frætt um eini høli. Teir lógu fram við, og tað eydnaðist umsíðir at fáa innivist.

2. juni 2002 fingu teir ein sangara fyri fyrstu ferð, og hann hevur verið við síðani tá.

Teir spæla harðan rocktónleik og tóku nógv á bóli, tá ið teir spældu í 2. umfari av Prixnum. Síðani hava boð verið eftir teimum til fleiri konsertir kring landið.

## Lawetz

**Høgni Reistrup – sang.**
**Ísak Sambleben – bass.**
**Høgni Fagraberg – gittar.**
**Sveinur Dam – gittar.**
**Rúni K. Mouritsen – trummur og slagverk.**
**Dávur Juul Magnusen – trombone.**

Tónleikararnir í bólkinum hava spælt tónleik í nógv ár, summir hava eisini spælt saman síðani teir vóru heilt ungir. Men samansetingin undir navninum Lawetz er fýra mánaðar gomul.

Tónleikararnir eru allir tannáringar, úr 17 og upp í 19 ára gamlar. Men talan er um tónleikarar, sum gera nógv við tað, og sum spæla annað enn rocktónleik. Fýra av tónleikarunum spæla eisini við í Føroya Symfoniorkestri, og onkur teirra stílar eftir upptøku á konservatorii um nøkur ár.

Lawetz eitt bland av poppi, rocki og eitt sindur av funk.



## Headache Blues Treo

**Uni R. Debess – sang og gittar**
**Leivur Thomsen – gittar**
**Edvard Nyholm Debess – bass og sang**
**Rógvi á Rógvu – trummur**

Headache Blues Treo hevur umleið eitt hálvt ár á baki og hevur spælt á ymsum støðunum í Havn og í 1. umfari av Prixnum.

Stílurin er blues, men Headache Blues Treo hevur sín heilt egna blues-stíl, ið er nógv merktur av teimum einstøku tónleikarunum í bólkinum.

Vanliga spælir bólkurin eina blanding av egnum løgum og løgum hjá til dømis Doors, Jimi Hendrix og øðrum. Men til Prix Føroyar spælir bólkurin bert egið tilfar.

Til hálvfinaluna leygarkvøldið er ein tónleikari í bólkinum skiftur út. Búi Dam er farin uttanlands, og tí fer garvaði og virdi gittarspælarin Leivur Thomsen at loysa av.



## Gestir

**Ólavur Hansen – sang og gittar**
**Torfinnur Jákupsson – gittar**
**Knút H. Eysturstein – ljómborð og sang**
**Niels Jákup í Jógvanstovu – bass**
**Jógvan Andrias á Brúnni – trummur**

Bólkurin varð stovnaður á summri 2002, og síðani hevur hann spælt til onkrar einstakar konsertir. Teir hava spælt í Losjuni í Gøtu, og teir vóru við á Tutl-konsertini í Útvarpshøllini í fjør.

Ein sangur hjá bólkinum er givin út, tað er á livefløguni hjá Tutl, sum eisini kom út í fjør.

Sangarin og gittarspælarin eru brøður, og teir hava spælt nógv saman. Teir hava tó spælt lítið alment, og tað er ikki fyrr enn nú, at teir rættiliga fáa møguleikan at koma undir sjóneykuna hjá teimum tónleikaáhugaðu.

Gestir spælir alternativan rocktónleik – sveimandi og inniligt.



## Fluffy Toys

**Einar Jacobsen – sang**
**Dagfinn Joensen – gittar og kór**
**Bjarti Hansen – gittar og kór**
**Kenneth Hansen – bass**
**Janus Nicolajsen – trummur**

Bólkurin bleiv stovnaður á heysti í 1999 og hevur sostatt 3 ár á baki. Hesi árini, bólkurin hevur verið virkin, hevur hann spælt nógv til dans kring landið, t. d. í TB-húsinum á Tvøroyri, Kagganum í Tórshavn, Lognbrá og Klubbanum í Klaksvík og aðra staðni.

Bólkurin hevur fyri tað mesta vant í Losjuni í Gøtu, men har eru umstøðurnar ikki tær bestu, av tí at nógvir aðrir bólkar venja eisini har. Tað ger, at útgerðin má setast upp og takast niður, hvørja ferð tað verður vant. Og so eru limirnir nokk so spjaddir – tríggir búgva í Tórshavn, ein í Gøtu og ein á Toftum.

Í løtuni lænir bólkurin eitt høli Margarinfabrikkini í Havn, og tað hevur gjørt sítt til, at glið nú er komið á at gera egið tilfar.

Stílurin má sigast at vera rockur – hvørki meira ella minni. Íblásturin kemur fyri tað mesta úr 70-ára rockinum, t.d. frá Black Sabbath, Deep Purple, Whitesnake og øðrum bólkum. Men tónleikurin ber eisini brá av onkrum nýggjari.



## G! festivalurin vil hava Prix-bólkar

Prix Føroyar tónleikakappingin kastar nógv av sær til fyrireikarar av konsertum kring landið. Tá ið Prixið er í gongd eru nógvir bólkar virknir, og hetta gevur fyrireikarum eitt nógv størri úrval at velja ímillum til tey ymsu tiltøkini.

Eitt av stóru tiltøkunum í summar verður G! festivalurin, sum verður hildin fyri aðru ferð, og eisini fyriskipararnir av hesum festivali halda eitt vakið eygað við Prix-bólkunum.

– Tað eru nógvir áhugaverdir bólkar við í Prix Føroyum í ár, og eg ivist ikki í, at fleiri teirra verða við á G! festivalinum í summar, sigur Sólarn Solmunde.

G! festivalurin fer rættiliga upp í eitt annað gear, tí í summar verður festivalurin í tríggjar dagar, og fleiri útlendskir bólkar koma til Gøtu at spæla.

Høvuðsnavnið verða finsku Bomfunk MC's, sum eru víðgitnir fyri sangir sum Frestylers, Live your Life og Super Electric. Aðrir útlendskir bólkar koma eisini til festivalin, og harafturat fara sjálvsagt fleiri føroysk nøvn at spæla.

ítróttur

Nr. 51 • hósdagur • 14. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Góðu úrslitini kostaðu

**Felagið væntar, at í 2003 verður væl betri fíggjarliga**

AÐALFUNDUR
*Páll Holm Johannesen*



*Hóast runavíkingar høvdu besta árið ítróttarliga í fjør, so hevði felagið eitt stórt hall*
*Mynd: Savnsmynd*

Mikukvøldið hevði NSÍ sín árliga aðalfund. Ítróttarliga var 2002 besta árið hjá NSÌ nakrantíð. Felagið gjørdist steypavinnari, og í 1.deild endaði NSÍ á øðrum plássi. Við teimum yngri deildinum vann felagið 10 heiðursmerki.

Á figgjarliga økinum vóru úrslitini kortini heldur lakari. NSÍ hevði eitt hall á 257.000 krónur. Á útreiðslusíðuni var tað serliga virksemið hjá leiðslubólkinum, sum kostaði.

Leiðslubólkurin er bólkurin, ið tekur sær av 1.liði felagsins. NSÍ setti øll segl til í fjør, har fleiri nýggir leikarar komu til felagið. Lønirnar hjá fleiri av leikarunum hava ivaleyst eisini virka til stóra hallið.

Formansfrágreiðingin sigur eisini, at aðrar orsøkir til stóra hallið er minkandi inntøkur av ymiskum aktivitetum, umframt ætlanir, ið ongantíð komu í gongd.

Niðurstøðan á áðalfundinum var stutt og greitt, at fíggjarliga royndist árið illa, meðan ítróttarliga var tað besta árið nakrantíð. Á fíggjarætlanin fyri 2003 verður mett, at felagið fer at hava eitt yvirskot á 200.000 krónur

### Nevndarval

Sum vanligt varð eisini nevndarval á skránni mikukvøldið. Bæði Jákup Mortensen og Dánjal Jákup Højgaard, sum stóðu fyri vali til starvsnevndina, vórðu afturvaldir. Sum tiltakslimir vórðu vald Bjarni Kjeld og Rósing Johannesen.

Enn hevur starvsnevndin ikki skipað seg, men væntandi heldur hon fram sum undan aðalfundinum. Hinir nevndarlimirnir eru Hans Petersen og Atli Olsen, umframt eitt umboð fyri fótbóltsnevndina.

Í fótbóltsnevndina varð Kári Finnsson afturvaldur og nývald vórðu Mildrið Hentze og Oddfinn Olsen. Tiltakslimir í fótbóltsnevndini vórðu Ruth Davidsen og Sverri Justinussen, og har sita frammanundan Jonhard Hansen og Súnfríð Nielsen.

# Óli skoraði í fyrsta dystinum

**Møguliga verður John Heri Dam eisini í Hvidovre-hópinum, sum møtir FC Århus sunnudagin**

ÚTISETAFELAG
*Páll Holm Johannesen*



*Óli Johannesen gjørdi skjótt av, og skoraði longu í sínum fyrsta dysti, eftir at hann vendi til Hvidovre.*
*Mynd: Savnsmynd*

Føroyski landsliðsliðskiparin, Óli Johannesen, skoraði í síðnum fyrsta dysti, síðan hann vendi aftur til Hvidovre. Leygardagin leikti Hvidovre venjingardyst i Lyngby og tapti 2-1. Óli Johannesen minkaði um munin uppá beinleiðis fríspark, eftir Lyngby hevði lagt seg á odda 2-0 frammum við tveimum málum.

### Óvist við John Hera

Tá Hvidovre sunnudagin fær vitjan av FC Århus, vera møguliga tveir føroyskir leikarar við í Hvidovre-hópinum. Umframt Óla Johannesen, so venur John Heri Dam í løtuni eisini í Hvidovre.

Hann er ímillum 24 leikarar, sum royna at vinna sær pláss millum teir, sum skulu vera við ímóti FC Århus. John Heri var ikki tøkur til dystin ímóti Lyngby, og mikudagin spældi hann á 2.liði hjá Hvidovre.

Fríggjadagin fer Hvidovre venjarin, Jan Christensen, at kunngera hópin til dystin ímóti FC Århus.

# Tennis við aftur á oyggjaleikum

**Luttøkan á oyggjaleikunum skal birta nýtt lív í ítróttargreinina**

TENNIS
*Páll Holm Johannesen*

Seinastu árini hevur ikki verið nógv hoyrt til ítróttargreinini tennis. Síðan oyggjaleikirnar í 1999 hevur tennis rættiliga ligið í dvala. Nú ætla tennis-áhugaði aftur at birta lív í ítróttargreinina. Tá føroyska ítróttarliðið fer á oyggjaleikirnar í Guernsey í summar, verður tennis ein av ítróttargreinunum, sum verður umboðað.

Luttøkan á oyggjaleikunum er ein roynd í fáa gongd á ítróttargreinina aftur. Fyrstu árini var ein árlig FM-kapping hjá bæði kvinnum og monnum, men seinnu árini hevur ongin FM-kapping verðið hildin.

Tað verður ætlandi 4 luttakarar á tennis liðnum. Tveir av tennis leikarunum búgva uttanlands, og tí eru bert 2-3 leikarar, sum venja í Føroyum. Venjingin fevnir serliga um tað kropsliga, og eina ferð um vikuna verður vant tennis innandura. Tennis-leikararnir hava ikki nakran venjara, og tí standa teir sjálvir fyri venjingini.

### Vilja hava tennishøll

Jón Brekku er ein av tennis leikarunum, sum væntandi verður við á oyggjaleikunum í summar. Hann sigur at um tað skal vera ítróttargreinini lív laga, so er neyðugt við eini tennis-høll í høvuðsstaðnum.

Ein slík høll er størri enn vanligar hondbóltshallir, og hon kann brúkast til annað, enn bara tennis. Sjávur metir hann bæði fótbólturin og eitt nú kurvabóltur kundu havt gagn av einari tílikari høll. Tað hevur verið roynt at tosa við býraði, men har hendir onki, sigur Jón Brekku at enda.

# Útlendingar við í FM í ár

TALV
*Páll Holm Johannesen*

Komandi mánað verður FM fyri einstaklingar í talvi. Kappingin verður heldur øðrvísi í ár, enn undanfarin ár. Sum nakað nýtt eru útlendingar bjóðaðir við. 16 telvarar vera við í landsliðsbólkinum, og av teimum eru 10 føroyingar. Hvørjir teir tíggju føroyingarnir verða í landsliðsbólkinum verðir avgjørt eftir styrkistalið

Í landliðsbólkinum verður telvað 11 umfør eftir FIDE Schweizer skipanini. Tað er longu greitt, hvørjir teir seks útlendsku telvararnir vera. Teir eru IM Eirik Gullaksen 2354 úr Noreg, IM Christian Jepson 2412 úr Svøríki, IM Kim Pilgaard 2437 úr Danmark, IM John Shaw 2470 úr Skotlandi, IM Sævar Bjarnason 2262 úr Íslandi og GM Heikki Westerinen 2374 úr Finlandi.

Besti føroyingurin verður kosin Føroyameistari. Einstaklinga-FM verður í døgunum 12-19 apríl á Læraraskúlanum.